

*Anna Mortensen, leiðari og útlærdur hondarbeiðslærari leggur einari gentu lag á. Bæði gentur og dreingir hava seymað sær kular húgvur síðstu dagarnar*

# Kul at vera ung á Tvøroyri

**Við nýggja ungdómshúsinum fær Tvøroyri endiliga eina sjónliga ungdómsmentan, sum vónandi fær stóran týdning fyri býin, sigur Anna Mortensen, leiðari fyri Pakkhús 4**

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nú Tvøroyri hevur fingið sítt egna fína ungdómshús fer ein syndarlig býarmynd vónandi eisini í søguna: Myndin av passivum ungdómum, sum vála aftur og fram og trunka seg saman uttan fyri Statoil uttan mál ella mið. Hetta er í øllum førum vónin hjá nýsetta leiðaranum í ungdómshúsinum Pakkhús 4, Onnu Mortensen.

- Tey ungu eru á full av orku, hugskotum og eldhuga. Við nýggja ungdómshúsinum fáa tey nú møguleika fyri at gera dreymar til veruleika, sigur hon við Sosialin. Vit vitjaðu ungdómshúsið í sambandi við hátíðarhaldið um vikuskiftið, har Seglhúsloftið og Pakkhús 4 hjá P/f T.F. Thomsen vórðu tikin alment í nýtslu.

## Livandi virksemi

Tríggir ungir dreingir í ítróttarbúna spæla pool. Teir taka væl ímóti, og stilla gjarna upp til myndatøku. Í bakgrundini spæla ein genta og ein drongur fótbóltsspæl, meðan onnur sita í djúpu sofunum og hyggja í sjónvarp við beinunum uppi á borðinum. Øll eru tey samd um, at nýggja ungdómshúsið er ordiliga gott, og at tey avgjørt fara at brúka nógvar tímar her.

Vit finna leiðaran Onna Mortensen á aðru hædd, har hon hjálpir nøkrum gentum og dreingjum við at seyma smartar húgvur í alskyns litum. Hon er útbúgvin hondarbeiðslærari, og greiðir okkum frá, at nýggja ungdómshúsið er opið tríggjar dagar um vikuna: týsdag, mikudag og fríggjadag millum kl. 14 og 22. Tey ungu í 4.-7. flokk eru har um dagin og tey eldru um kvøldi. Í fyrsta umfari verða tvey starvsfólk knýtt at húsinum, Anna sjálv 30 tímar um vikuna, og Trygvi Strøm, musikkpedagogur og gittarspælari, 25 tímar.




*Skráin komandi dagarnar*

- Eg rokni við, at tað fær stóra ávirkan fyri býin, at tey ungu nú verða meira sjónlig, bæði við tiltøkum og øðrum livandi og skapandi virksemi, sum fer at seta sín serliga dám, sigur Anna Mortensen.

Hon vísir á, at hóast húsið bara hevur verið opið í fýra dagar, hava tey ungu tikið væl undir við tí.

- Serliga tey yngru hava møtt væl upp. Tey eldru eru kanska eitt sindur meira varin. Men nú mugu øll líka blíva trygg við húsið og við okkum starvsfólk, so tey kenna, at hetta er teirra stað, sigur Anna. Hon vísir á, at fólk skulu venja seg við, at býurin nú hevur eitt ungdómshús.

- Hetta er ikki ein ansingarstovnur men eitt virkið hús fyri børn og ung, sum koma og fara, sum tey vilja. Men vit hava ábyrgdina fyri teimum, tá tey eru inni her, sigur Anna Mortensen.

## Fjølbroytt virksemi

Leikluturin hjá starvsfólkunum í ungdómshúsinum er at vera íbirtarar og at eggja teimum ungu í virkseminum, tey takast við.

- Í fyrstani verða vit meira aktiv, so tey ungu fáa eina hóming av, hvørjir møguleikar eru. Men so við og við er ætlanin, at tey sjálvi skulu seta dagsskránna, sigur Anna. Spurd, hvørji hugskot tey hava um ymisk tiltøk, ímyndar hon sær størri og smærri verkætlanir, so sum jólamarknað niðri við pakkhúsini við vørum, bakstri, kafé og tónleiki.

- Vit hava eina lokala útvarpsstøð her suðuri, so tað hevði verið upplagt, at vit gjørdu eina ungdómssending. Keypt er eitt fínt videotól og ein góð multimedia telda, so til ber at framleiða film, mynda- og tónleikatilfar, greiðir hon frá.

Eisini er eitt søgurúm, har tey kunnu taka støði í einum hugtaki ella teksti, sum upptekur tey ungu, og gera eina framsýning ella framførslu um tað. Ein partur av ovaru hæddini er innrættaður til kreativan